# Býráðið

**Dagfesting:** 16.01.2025 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Gudny Vang fyri Ólavur Larsen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 1/25 | 25/00022-2 | Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu |
| 2/25 | 24/00621-10 | Val av valstýrinum fyri Hellurnar valskeiðið 2025-2028 |
| 3/25 | 25/00031-1 | Áseting av býráðsfundum í 2025 |
| 4/25 | 25/00032-2 | Uppskot til viðtøkubroytingar í SEV |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

# 1/25
# 25/00022-2 Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.01.2025 | 1/25 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Nú nývalda býráðið fyri valskeiðið 2025-2028 hevur skipað seg er tørvur á ymiskum dagføringum í kommunustýrisskipanini.<br><br>Talan er um hesar tillagingar:<br>• §25 og §27 á síðu 7 og 8: Ungdómshúsið verður flutt frá Mentamálanevndini til Sosialu nevnd, har tað hevur verið síðani tilboðið var fyrireikað og stovnað. Eisini verður §25, 7. petti, sum umfatar frítíðarundirvísing og musikskúlaskipanina flutt frá Mentamálanevndini til Sosialu nevnd §27 8. petti, fyri at sleppa undan gegnistrupulleikum.<br>• §30 á síðu 9: Her var áður grein um skattakærunevnd, sum nú er avtikin. Í staðin er sett inn grein um Kambsdalsnevnd, sum politiskt ynski er um at seta á stovn.<br>• §32 á síðu 10: Her eru tillagingar gjørdar tí barnaverndarnevndin í seinastu býráðssetu varð broytt frá 4 til 5 limir eftir ynski frá Barnaverndarstovuni.<br>• §37 á síðu 11: Bygginevnd fyri barnaskúlan verður broytt til bygginevnd fyri 64-skúlan v.m.<br>• §38 á síðu 11: Nýggj grein sett inn við skipan av nevnd fyri Miðbýarætlanina.<br>• §38 á síðu 11 og 12: Gamla §38 Arbeiðs/hugskotsbólkur í samband við eldrabygging strikað.<br>• §39 á síðu 12: Arbeiðsbólkur í samband við bygginga av heilsumiðstøðini í FK-bygninginum strikaður tí byggingin er liðug. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært § 5. í kommunustýrislógini skal kommunustýrið áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | • Kommunustýrislógin<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Kommunustýrisskipan Fuglafjørður við broytingum 06.01.2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til at býráðið viðgerð uppskotið til broytingar um neyðugt ger tillagingar og góðkennir broytingarnar við 1. viðgerð á býráðsfundinum 16. januar 2025. | | |
| Dagf | 06.01.2025 | | |

**Býráðið 16. januar 2025:**
Breið semja var um, at §38 Arbeiðs/hugskotsbólkur í samband við eldrabygging ikki eigur at verða strikað, men halda fram og tillaga orðing verður gjørd til aðru viðgerð. Jastrid á Dalbø spurdi um møgulleiki er, at annar limur enn borgarstjórin kann luttaka í Kambsdalsnevndini. Borgarstjórin mælir til at hetta verður tikið til viðgerðar við aðru viðgerð.



Málið varð sostatt einmælt samtykt at fara til aðru viðgerð.

## 2/25
## 24/00621-10 Val av valstýrinum fyri Hellurnar valskeiðið 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.01.2025 | 2/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Á býráðsfundinum 31. desember, datt valið av valstýrinum til kommunu-, løgtings- og fólkatingsval fyri Hellurnar, niður ímillum. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Hellurnar, sum sjálvstøðugt valstað skal hava valstýrið til kommunu-, løgtings- og fólkatingsval. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | Mælt verður til at núverandi limir í øllum trimum valstýrinum halda áfram. Tey eru Jórun Eið Johannesen, Elibert Kerá, Símun Hans Jacobsen og Ernst Jacobsen. | | |
| Dagf | 08.01.2025 | | |



**Býráðið 16. januar 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 3/25
## 25/00031-1 Áseting av býráðsfundum í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.01.2025 | 3/25 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Skotið verður upp at býráðsfundirnir í 2025 verða hildnir í býráðssalinum í Støð 5 í Fuglafirði hesar dagar:<br><br>• Hósdagin 30. januar.<br>• Hósdagin 27. februar.<br>• Hósdagin 27. mars.<br>• Hósdagin 1 mai. (páskirnar eru seinnu helvt í apríl, tí er uppskotið 1. mai)<br>• Mikudagin 28 mai. (29 mai er Kristi himmalferðardagur)<br>• Hósdagin 19. juni.<br>• Hósdagin 28 august.<br>• Hósdagin 25 september.<br>• Hósdagin 30 oktober.<br>• Hósdagin 27 november.<br>• Hósdagin 11 desember. (um okkurt mál krevur tvær viðgerðir eru 14 dagar ímillum henda og undanfarna fund)<br><br>Fundirnir byrja kl. 19.00<br><br>Fyri at geva býráðslimum rímiliga tíð, at fyrireika seg til málini er skynsamt, at fíggjarnevndarfundurin liggur umleið eina viku frammanundan býráðsfundinum og aðrar fastar nevndir umleið 14 dagar frammanundan býráðsfundinum. Hetta tí ofta kemur fyri at mál frá øðrum føstum nevndum skulu umvegis fíggjarnevndina áðrenn tey verða løgd fyri býráðið. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §4 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, skal býráðið taka avgerð um nær og hvar vanligir býráðsfundir skulu vera og skal hetta kunngerast við byrjanina av hvørjum álmanakkaári. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>• Kommunustýrislógin(§13) og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu. |
| Viðgerð | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | N | n |
| | Umsitingarligar | N | n |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tí uppskotinum til býráðsfundir í 2025, sum stendur í lýsingini av málinum. | | |
| Dagf | 09. januar 2025 | | |

**Býráðið 16. januar 2025:**
Breið semja er um, at tveir fundir verða hildnir uttanfyri býráðssalin, ein á Hellunum og ein á Kambsdali. Nærri nær hesir fundir verða hildnir verður kunngjørt frammanundan. Málið varð soleiðis einmælt samtykt við hesum broytingum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**4/25**
## 25/00032-2 Uppskot til viðtøkubroytingar í SEV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.01.2025 | 4/25 |

**Tilráðing**

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Býráðnum</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td colspan="3">Formansskapurin í Føroya kommunufelag saman við umsitingini hava ígjøgnum longri tíð arbeitt við uppskoti um viðtøkubroytingar fyri SEV. Arbeiðið er nú komið so mikið ávegis at ætlanin er, at leggja tað fyri eykaaðalfund í SEV í næstum.<br><br>Í høvuðsheitum er talan um hesar broytingar:<br><ul><li>At politiska umboðanin í nevndini fyri tey seks økini uttanfyri høvuðsstaðin framyvir verður mannað av borgarstjórum meðan Tórshavnar kommunu kann velja ímillum borgarstjóra og annað politiskt umboð. Í núverandi viðtøkum kunnu allir býráðslimir verða valdir í SEV-stýrið.</li><li>At nevndin framyvir eisini verður mannað við 2-3 serfrøðingum.</li></ul>Harafturat eru broytingar í áseting um førleikar hjá serfrøðingunum, samsýningar, formansskapi, forskotnari starvstíð, talgilt samskifti o.a.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Uppskot til broytingar í viðtøkunum fyri SEV væntast, at verða lagt fyri eykaaðalfund í næstum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">Møgulig fylgiskjøl<ul><li>Undirskjal til punkt 6 Teldupostur 01.11.2024 frá Kommunufelagnum</li><li>Undirskjal til punkt 6 Uppskot til viðtøkubroytingar frá formansskapinum í kommunufelagnum</li><li>Undirskjal til punkt 6 og 7 Tilmæli frá nevndini í Sev</li></ul></td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>N</td><td>n</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>N</td><td>n</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at býráðið viðger uppskotið til broytingar í viðtøkunum fyri SEV og gevur til kennar um tað tekur undir við viðtøkubroytingunum. |
| Dagf | 10.01.2025 |

**Býráðið 16. januar 2025:**
Breið semja varð at taka undir við uppskotinum um viðtøkubroytingar burtursæð frá, at kommunan skal senda hoyringsskriv um at vanligir býráðslimir framvegis kunnu veljast í nevndina og uppskot til broytingar um hvussu nógvar atkvøður stóru kommunurnar kunnu hava.[Gem]



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 20.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Gudny Vang

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

9

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen